# Einki steyp til Laudrup

Tað eydnaðist ikki Michael Laudrup og Getafe at vinna fyrsta stóra steypið av týdningi til lítla Madrid-felagið. Í sponsku steypafinaluni í gjárkvøldið tóktust spælararnir hjá Getafe als ikki til reiðar, og eftir lítlari løtu høvdu Mata og Alexis skotið Valencia upp á 2-0, og so var mótbrekkan tung. Tað eydnaðist tó Granero at minka um munin við brotssparki, og í seinna hálvleiki átti sami Granero onkra góða roynd. Men dagsins maður á Vicente Calderon gjørdist Fernando Morientes, sum við 3-1 málinum enn einaferð prógvaði, at hann hevur máltev sum fáur.



# Frem misti sigurin

Frem við Atla Danielsen hevði í gjár vitjan av SønderjyskE, og leingi sá út til, at talan skuldi gerast um fjórða sigurin á rað hjá Valby-felagnum. Stutt eftir steðgin skoraði Martin Jürgensen nevnliga til 2-0, men við einum framúrskarandi avriki seinastu 20 minuttir megnaði SønderjyskE kortini at bjarga sær ein 2-2 javnleik. Fram hevur mist seks stig hetta kappingarárið, men góðu úrslitini í vár hava tó flutt liðið burtur frá niðurflytingarvandanum.

B71-EB/Streymur 1-1 (0-1):

# Sandoyingar halda vónini

**EB/Streymur megnaði ikki at taka spenningin úr hálvfinaluni eftir fyrra dystin. Við útjavnandi málinum syrgdi Tummas Pauli Olsen fyri, at spenningurin enn er høgur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

EB/Streymur var favorittur. Tað var tað eingin ivi um, tá ein av FM-kandidatunum vitjaði hjá B71, sum av mongum verður mett sum niðurflytingarkandidatur. At B71 eisini vantaði Rasmus Nielsen og Símin Hansen gjørdi ikki støðuna betri hjá vertunum, sum tó sjálvandi høvdu 11 mans við sær á vøllin, kortini.

Og teir royndu eisini at leggja eitt ávíst trýst á EB/Streym frá fyrsta bríksli. Hetta var um at geva úrslit, tá Clayton Soares langaði fríspark á stólpan, men ta ferðina sluppu gestirnir við skrekkinum.

Útgangsstøðið hjá EB/Streymi var hampuliga verjukent, har teir fyrst og fremst ansaðu eftir, at mál ikki varð skotið ímóti teimum. Og við kviku framherjunum, sum liðið eigur, varð síðani roynt at seta ígongd snarálop niðan eftir vøllinum.

Tað var tó ein deyðbóltur, sum legði gestirnar framum. Marcell vann sær fríspark í høgru, og tá bólturin varð sendur aftur um allan trunkan framman fyri máli, kundi Mikkjal Thomassen við handara stólpa beina bóltin í netið.

### Tummas Pauli bjargaði

Og so helt dysturin annars fram í sama lag. Við B71 sum liðið, ið hevði bóltin meira, men har EB/Streymur í fleiri førum høvdu vandamikil kontra.

B71 hevði eisini sínar møguleikar, men ofta varð ikki avsluttað nóg neyvt, og onkra ferðina mátti René Tórgarð prógva, hví hann verður roknaður millum bestu málverjar í landinum. Tepra leiðslan tóktist halda sær, men bara fýra minuttir fyri dystarlok fekk B71 vónina aftur.

Tummas Pauli Olsen hevði verið nær við onkra ferð áður í dystinum, og tað varð hann, ið gjørdist dagsins maður á Sandoynni. Hornaspark varð sent innfyri, og har var Tummas Pauli fyrstur á bóltinum, sum varð sendur í málið.

### Púrasta opið

Við 1-1 og útivøllarmáli er tað helst EB/Streymur, sum hevur fyrimunin undan seinnu hálvfinaluni. Tann dysturin verður á við Marg-áir á Streymnesi tann 12. mai, men heilt uttan møguleika eru sandoyingarnir so langt ífrá.

Gamaní skulu teir fram á vøllin at skora eitt mál, men megna teir at halda so hampuliga tætt í verjuni, so eru 90 minuttir rímiliga long tíð, og tí er tað mesta púrasta opið, tá spurningurin skal svarast, hvat av liðunum skal til Havnar at spæla finalu tann 15. juni.




*EB/Streymur er framvegis favorittur til finaluplássið, men teir fingu ikki nakað finalupláss forerandi, tá teir vitjaðu á Sandi í gjár*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

## FAKTA

**B71-EB/Streymur 1-1 (0-1)**
0-1: Mikkjal Thomassen, 20.
1-1: Tummas Pauli Olsen, 85.

B68-NSÍ:

# Fyrsta grannauppgerðin í tvey ár

**Fimm ár eru síðani, at B68 seinast fekk fulla úrtøku á heimavølli ímóti NSÍ, sum hesa ferð kanska skal spæla uttan tveir av ungu monnunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrsta uppgerðin í 2. umfari, sum verður spælt, eftir at 3. umfar er avgreitt, verður seinnapartin leygardagin. Talan verður um grannauppgerð, tá ið NSÍ fer út á Svangaskarð at vitja B68.

NSÍ hevur hagtølini á sínari síðu. Í mong ár var B68 oftari oman á, enn teir í Runavík vóru tað, men nú er vent í holini. B68 hevur ikki vunnið á heimavølli ímóti NSÍ síðani 2003, tá ið toftamenn vunnu tætta og dramatiska uppgerð 3-2.

Í fjør var B68 í næstbestu deildini, og í fyrraárið vann NSÍ trivaligan 5-1 sigur á Svangaskarði.

B68 er eftir tveir dystir framvegis stigaleyst, og hóast toftamenn hesa ferð – fyri fyrstu ferð í ár – eru á heimavølli, so mugu teir smyrja seg við, at tað eru meistararnir í NSÍ, sum eru favorittar.

NSÍ ferðalagið kom til hús aftur mánakvøldið, eftir at NSÍ leygardagin í innandurða høll tapti 5-2 ímóti íslendska meistaraliðnum Vali.

Leygardagin sótu tveir av ungu monnunum alla tíðina á beinkinum, tí teir vóru ikki førir fyri at spæla. Talan var um miðverjan Jóhan Troest Davidsen og álopsspælaran Øssur Dalbúð. Teir hava báðir verið plágaðir av knæskaða. Hvørgin teirra hevur í vikuni vant saman við hinum. Teir skuldu royna at venja í kvøld, og tá fekst at síggja, um teir verða førir fyri at spæla leygardagin ella ikki.

Í Íslandi var Pól Jóhannus Justinussen, sum í fjør spældi við GÍ, miðverji, og tað er møguleiki fyri, at hann aftur leygardagin fær møguleikan, um Jóhan Troest Davidsen ikki verður tøkur.

Hjá B68 hava Arnbjørn Danielsen og Ralf van Dooren ikki vant saman við hinum í hesi vikuni. Tað verður tó roknað við, at teir báðir verða tøkir leygardagin. Senegalesisku spælararnir hava eisini havt smávegis trupulleikar, men teir verða heilt víst við ímóti NSÍ, verður sagt av Toftum.

Hóast B68 tapti í Streymnesi sunnudagin, so metti B68 venjarin, Bill Jacobsen, at leikliga avrikið var gott, og at tað í tí uppgerðini var nógv at byggja víðari á.